## Telja umaftur

Ein ST-nevnd, sum heldur eyga við uppteljingini frá forsetavalinum í Afghanistan, hevur gjørt av, at í 10 prosentum av valstøðunum skulu atkvøðurnar teljast umaftur, tí nevndin hevur illgruna um valsvik. Í síðstu viku gav nevndin boð um, at atkvøðurnar í nøkrum øðrum valstøðum skuldu eftirkannast, tí har vóru greiðar ábendingar um, at alt var ikki, sum tað eigur at vera. Kanadiumaðurin Grant Kippen, sum er formaður í eftirlitsnevndini hjá ST, sigur, at atkvøðurnar í 2.500 valstøðum skulu teljast umaftur. Forsetavalið í Afghanistan var tann 20. august.




## IKEA væl umtókt

Næsta vár letur svenska handilsketan IKEA upp eina nýggja deild í Aalborg, og sambært einari talskvinnu hjá fyritøkuni fer tað ikki at standa á at fáa starvsfólk til ta nýggju deildina. IKEA skal hava 300 starvsfólk í Aalborg, men fyritøkan væntar at fáa millum 10.000 og 15.000 umsóknir til tey 300 størvini, skrivar Nordjyske Stiftstidende. Nýggja vøruhúsið hjá IKEA verður 30.000 fermetrar stórt og letur upp tann 1. mars næsta ár. Tey 300 størvini verða lýst leys í næsta mánaði og sett seinni í ár.

# Fyrsta spanskt-føroyskt orðabókin komin

**Nú ber til at leita fram føroysk orð beinleiðis úr sponskum í nýggjari skúlaorðabók**

ORÐABÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eitt nýbrot í føroyskum orðabókaarbeiði kallaði Jógvan í Lon, málfrøðingur, tað, tá nýggja spanska-føroyska orðabókin varð løgd fram í Miðlahúsinum fríggjadagin.



*Eina stórhending kallaði málfrøðingurin Jógvan í Lon tað, at eitt beinleiðis portur úr sponskum inn í føroyskt nú er latið upp*




*Randi Meitil og Birgit Remmel, lærarar í sponskum og føroyskum, greiddu frá arbeiðinum við nýggju spanskt-føroysku orðabókini*

### Nýtt portur

Tað eru tær báðar Randi Meitil og Birgit Remmel, málfrøðingar og lærarar í sponskum og føroyskum, ið hava gjørt nýggju orðabókina. Bókin er serliga ætlað miðnámsskúlunum. Í bókini eru útvald leitorð, ið eru mest viðkomandi hjá miðnámsskúlanæmingum og øðrum, ið vilja læra spanskt.

Í sambandi við framløguna vísti Jógvan í Lon á, at á hvørjum ári læra á leið 200 føroyingar seg spanskt á miðnámsstøði. Við nýggju orðabókini hava føroyingar, sum læra seg spanskt fyri fyrstu ferð møguleika at leita upp føroyskar týðingar beinleiðis úr sponskum uttan at noyðast umvegis danskt fyrst.

At eitt beinleiðis portur nú er latið upp úr sponskum inn í føroyskt má eisini metast at vera ein stórhending, havandi í huga, at spanskt telist millum heimsins størstu mál, vísti Jógvan í Lon á.

Sama dag, sum nýggja orðabókin kom út, gjørdist orðabókaportalurin hjá Orðabókagrunninum tøkur í nýggjum í sniði. Sum fyrsta skúlaorðabókin hjá Orðabókagrunninum hevur spanska orðabókin sítt serliga pláss á nýggja portalinum. Hesin portalur skal geva telduatgongd til allar tær orðabøkur, ið Orðabókagrunnurin gevur út – teirra millum móðurmálsorðabókina.

## Triðju flokkar sleppa á Listasavnið




Triðju flokkarnir í Tórshavnar Kommunu fáa í løtuni ein fyrrapart á Listasavni Føroya saman við listamanninum Oggi Lamhauge, sum vísir teimum runt og lærir tey at tekna

Tilboðið er galdandi 1.-18. september 2009 frá klokkan 9 til 11 hvønn skúladag, veit heimasíðan hjá Tórshavnar Kommunu at siga.

Fyrra tíman ganga næmingarnir runt á Listasavninum, har Oggi Lamhauge sýnir fram og greiðir frá ymsu listaverkunum. So er fríkorter, har høvi er at fara útum í Plantasjuna og kanna, hvaðani gólvið í Listaskálanum er. Seinna tíman savnast næmingarnir í forhøllini at tekna eina mynd við støði í tí, teir hava sæð á savninum.

Tað er 100 ára haldið hjá Tórshavnar Kommunu sum hevur tikið stig til listatilboðið til triðju flokkarnar í kommununi.

Neyðugt er at tekna seg í góðari tíð og í seinasti lagi tríggjar skúladagar undan, hjá Listasavni Føroya á telefon 313579.

-ave-

# Litføgru føroysku húsini á filmi

**Eitt sigandi lítið brot um litføgru føroysku húsini er nú at finna á internetinum**

STUTTFILMUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Onkur kallar tey smakleys, onnur síggja tey sum eitt lívsjáttandi mótspæl til ofta gráa føroyska veðrið. Litføgru føroysku húsini vekja enn einaferð uppmerksemi í nýggjum stuttfilmi hjá Kovboy Film, sum er at síggja á netstaðnum You Tube.

### Míní hús!

Hóast filmsbrotið *Faroe Islands multi colored houses of Torshavn* er sera stutt, fær tað sagt heilt nógv um siðvenjuna hjá føroyingum at byggja og mála síni hús á ofta sera persónligan hátt.

- Í Føroyum vilja fólk eiga húsið, tey búgva í, og gera við tað, júst sum tey vilja, greiðir røddin í filminum frá á enskum og heldur fram

- Føroyingar hava lyndi til at hugsa sera individuelt, tá tað ræður um íbúðarmynstur. Ongin ognarskattur er í Føroyum - tað vilja tey ikki hoyra talan um - tí um okkurt er títt, so gert tú við tað, júst sum tú vilt.

Og sum vit síggja á myndunum, er hetta í also í serstakan mun galdandi, tá tað ræður um lit og snið á húsinum.

Filmurin er gjørdur í samstarvi við 100 ára haldið hjá Tórshavnar Kommuna




*Lítli filmurin um litføgru føroysku er sera sigandi og sjarmerandi*

Filmurin sæst her:
http://www.youtube.com/watch?v=seygjsuJTbc

## Nýgg venjibók í enskum




Miðnámsnæmingar hava fingið nýggja bók við venjingum í enskari málløru. Bókin hevur heitið *Klípið* og fylgir mállæruni *Lær teg enskt* eftir Unu Poulsen og Ásu Hátún. Bókin er skipað eftir orðaflokkum í stuttar kapitlar, sum aftur eru býttir sundur við bókstavum og tølum, sum ger tað lætt at finna og vísa á staklutir í tekstinum.

Teir stóru orðaflokkarnir hava fingið nakrar kapitlar í part, til dømis eru 10 kapitlar um sagnorð millum annað við nógvum venjingum við -ing formi.

Venjingarnar eru innsetingaruppgávur, týðing til enskt og úr enskum og uppgávur í setningsbygging. Uppgávurnar eru hóskandi at nýta í tímanum einsæris ella í felag.

Tað er forlagið Ungu Føroyar, sum hevur givið bókina *Klípið - mállæruvenjingar til miðnámsskúlan* eftir Bergljót av Skarði

-ave-